# Katrin Mørkøre 60 ár



Mánadagin 27. august verður Katrin Mørkøre á Eiði 60 ár. Dagurin verður hildin sunnudagin 26. august, tá ið øll eru hjartaliga vælkomin til Eiðis. Tað er einki at ivast í, at nógv fara at heilsa upp á Katrina, sum kennir óvanliga nógv fólk og er óføra at minnast til hátíðardagar hjá øðrum.

Katrin er havnarfólk. Foreldrini vóru Pavla og Jens Guttesen, sum búðu í Tórfinsgøtu.

Abbin á móðursíðuni var Jens Christian Dam úr Tróndargøtu, og omman var Katrina, sum var úr Innistovu í Vági í Klaksvík. Fyri stuttum var Katrin við til at fyrireika ættarstevnu fyri Innistovufólkunum.

Abbin á faðir síðuni var Jens Christian Guttesen, sum var havnarmaður, og sum er kendur fyri sín lut í ríka tónleikalívinum í Havn. Omman var Jóhanna, sum var ættað úr Kirkjugerði í Skálavík.

Katrin er familjukær og áhugað og innarlaga í ættarsøguni. Hon hevur gingið til ættargransking hjá John Davidsen, Ólavi Clementsen og Mariu Jacobsen, og hon er nevndarlimur í felagnum Ættarbandið.

Børnini hjá Pavlu og Jensi Guttesen eru Jóna (1946), Katrin (1947), Gunrið (1950) og Jens Christian (1955). Katrin býr á Eiði, og øll hini búgva í Havn.

Eftir fólkaskúlan arbeiddi Katrin hjá Másu og Herlufi Arnason, sum høvdu bókahandil, bókbindarí og so nógv annað í handlinum, ið var á horninum Sverrisgøta/Tórsgøta. Seinni gekk hon í handilsskúla, meðan hon lærdi á skrivstovuni hjá Balslev, og tá ið pf. Kartni Winther varð stovnað av Kartna Winther, Torbjørn Sørensen og Poul Michelsen og rak heilsøluna, sum Balslev hevði havt, fór Katrin at arbeiða hjá teimum.

16. september í 1972 giftist Katrin Jógvani K. Mørkøre á Eiði, og síðani hevur hon. búð í Kardumummubýnum á Eiði. Jógvan var sóknarstýrisformaður tá ið Katrin kom til Eiðis, og at vera skrivari var uppgávan hjá formanninum. Katrin kom so við og við upp í skrivarauppgávuna, og í 1990 varð hon sett sum skrivari hjá Eiðis kommunu.

Umframt í arbeiðslívinum hevur Katrin verið virkin á so mongum øðrum økjum. Hon sang í Ebenezerkórinum, og hon tekur mangt takið í Mizpa á Eiði. Hon hevur vakið eyga við so mongum og vitjar og dugnar so nógvum – bæði á Eiði og aðra staðni kring landið.

Trina á Trøllanesi, fastur Jógvan, búði hjá teimum, og av henni lærdi Katrin so mangt hondarbeiði. Eitt nú plantuliting, at tøva og at garva. Áðrenn hon fór til Eiðis hevði Katrin lært at veva hjá Olevinu Joensen og Marjuni Sigurðsdóttir, og hon hevur onkuntíð undirvíst í veving. Jørð er í húsinum, og hóast uppvaksin í Torfinsgøtu í høvuðsstaðnum, so smæðist Katrin ikki fyri at bóndast.

Øll, sum hava hitt Katrina, vita, at hon er ógvuliga tilvitað um alt, sum gongur fyri seg. Tey munnu eisini taka undir við, at hon er framúr hjartagóð og gestablíð, og at hon hugsar um hini, áðrenn hon hugsar um seg sjálva. Tað, sum hon kókar, steikir og bakar fer víða um landið.

Katrin og Jógvan eiga tríggjar dreingir: Jóannes (1974) er giftur Susan Østerø úr Klaksvík. Tey búgva á Eiði, og Jóannes arbeiðir hjá KJ Hydraulik á Kambsdali. Janus (1977) býr í Havn og lærir til skipselektrikara hjá El Service á Skála. Hann er giftur Mary fødd Poulsen og ættað úr Grønlandi. Ólavur (1985) er í danska herinum. Hann skal til Afghanistan í oktober.

Sunnudagin klokkan 14 verður føðingardagurin hildin í ítróttarhøllini á Eiði.

**J**

# Logos II í Reykjavík

Trúboðanarskipið Logos II, sum fyrr í mánaðinum vitjaði á Tvøroyri, kom til Reykjavíkar mikudagin 15. august. Skipað verður fyri tiltøkum bæði á landi og umborð, í sambandi við vitjanina.

Karl Robert Vang, umboðsmaður fyri OM í Føroyum, sigur úr Reykjavík, at skipið hevur verið væl vitjað. Í sambandi við Mentanarnáttini í Reykjavík seinasta leygardag høvdu tey umleið 1.000 vitjandi.

Fleiri føroyingar eru umborð á skipinum í sambandi við vitjanina í Íslandi. Annars sigla fimm føroyingar við skipinum í løtuni. Mikudagin 29. august fer skipið víðari til Cuxhaven í Týsklandi.

**mg**



*Logos II við bryggju í Reykjavík, har skipið verður til 29. august. Hetta er fyrsta ferð at eitt skip hjá OM vitjar í Íslandi*

## Dagurin

**25. august. Ludvík**, deyður í 1270. Kongur í Fraklandi, nevndur Ludvík hin Heilagi. Stóð á odda fyri fleiri krossferðum. Á einari ferð til Norðurafrika doyði hann av sjúku. Upprunaliga germanskt navn, ið merkir viðgitin og stríð.

**26. august. Líradagur**. Dagurin verður eisini róptur líramariumessa, men tað hevur ongan kristiligan ella kirkjuligan týdning; navnið hevur dagurin fingið bara av teimum mongu mariumessunum um heystið.

**27. august. Gebhardus**, deyður í 995. Biskupur í Konstanz í Týsklandi, liggur grivin í kleysturkirkjuni har, sum hann sjálvur sigst at hava latið byggja.

# Deyðadómurin avsagdur - men avrættingin útsett

JÓGVAN SUNDSTEIN



Í politikki stinga ósemjur seg ofta upp, og tí er eisini mangan neyðugt við neyðsemjum, og alt gott um tað. Men við hvørt virka loysnirnar ella neyðsemjurnar ógvuliga løgnar.

Løgtingsformaðurin hevur lagt uppskot fram um at avtaka fólksins fyrndargomlu umboðan á fyrndargamla Løgtingi okkara. Ein samtykt av hesum vil vera tað sama sum ein deyðadómur yvir nøkur demokratisk rættindi, sum allir partar av landinum hava. Í staðin skulu veljast nakrir persónar, sum vera settir upp á sentralgjørdar listar við upp til 41 nøvn á hvørjum lista. Hetta gevur onga trygd fyri, at allir partar av landinum fáa umboðan í løggevandi tinginum.

Tá so nakrir tinglimir ganga ímóti hesum verður samgongan kallað saman um málið, og ósemjan er so mikið stór, at tað ljóðar, at kanska verður nýval útskrivað. Og nýval er nakað, sum menn ræðast sum nakað av tí versta, sum hendir halda meginparturin av tingmonnum. Við hvørt er tað tó tað besta. Í staðin semjast tingmenn, í øllum førum floksformenninir, um, at málið hjá tingformanninum ikki skal galda til fyrstkomandi løgtingsval, men kortini skulu vit samtykkja tað nú, og so lata tað galda næstu ferð løgtingsval verður. Tað vil siga, at fyrndargamla tingið skal kunna hava sína fólkaumboðan eina ferð afturat, og so er liðugt.

Hetta fær meg at hugsa um støðuna í teim londum, sum hava deyðarevsing. Til dømis onkur av statunum í USA. Tað hendir seg, at rætturin avsigur deyðadóm, men hesin verður ikki framdur beinanvegin. Bíðað verður til guvernørurin hevur viðgjørt málið, og um hann samtykkir, so fer avrættingin fram. Tann dømdi fær soleiðis eitt sindur longur tíð at liva. Avgerðin hjá samgonguformonnunum, um hon annars vinnur frama í Løgtinginum, ger, at sandoyggjafólk og suðuroyingar, vágafólk og kanska onnur fólk aðrastaðni frá fáa útsett freistina at missa sína umboðan á tingi. Men tann tíðin kemur so um fýra ár.

Men okkurt skal onkur hava afturfyri. Avgerð verður eisini tikin um, at tað valdømi, sum hevur størstu umboðanina, Suðurstreymoy, skal fáa eina umdømisvaldan afturat. Ein sera løgin avgerð. Um talið skal broytast til 33, hví so ikki hækkað talið av eykavaldum frá 5 til 6 í staðin. Suðurstreymoy hevur frammanundan 8 umboð, tað er nóg mikið. Tey skulu ikki veljast eftir fólkatali, men eru ríkiliga før fyri at føra fram sjónarmiðini hjá valdøminum. Hinvegin kundi økingin av teim eykavaldu hjálpt nakað upp á tann lutfallsliga munin av mandatum flokkanna millum.

Men sum sagt dómurin er avsagdur, hann fær gildið í næsta valskeiði.

# Oljudálking aftur nú

Onkur fuglur er komin illa fyri av dálking, sigst. Ein ovurstór undirmeting. Hvussu kann nakar vera so býttur og billa sær inn, at bert onkur fuglur er raktur? Nei, øll, sum hava eitt lítið sindur av skili, vita, at allir fuglar har í økinum fyrr ella seinni verða raktir. Um tú ikki sært teir nú, so er tað tí, at teir longu eru farnir til botns.

Æður, dunnur, másar og hvat har annars er av fugli, síggja ikki oljuna fyrr enn tær eru mitt í henni, og so er ov seint.

Ein slík illgerð, sum at koyra olju í havið, gerst ikki ógjørd aftur. Alt livandi, sum er fyri, steindoyr.

Mátti tann seki blivið funnin og harðliga revsaður fyri sína óndu gerð.

**Djóraverndarfelagið**